# Idealisman er horvin



– Idealisman hjá ungdóminum er farin, og tað vísir seg at vera ógvuliga torført at fáa tey úr stólinum. Tað einasta, sum fær ungar føroyingar út á gøturnar, er stríðið fyri fleiri veitslum og betri møguleikum fyri alkoholnýtslu, og tað ger lítlan mun, sigur Óli Jacobsen eftir vitjan av suðurafrikansku Lorraine Britten

**– Mínar royndir í Amnesty hava víst, at tað er ógvuliga torført at fáa føroyingar at engagera seg í veruligar trupulleikar og taka aktiv stig at hjálpa neyðstøddum, har eg sjálvur fyrst og fremst eri sekur. Idealisman hjá ungdóminum er farin, og tað einasta, sum fær ungdómin út á gøturnar at mótmæla, er stríðið fyri betri ballingarmøguleikum, sigur stríðsmaðurin Óli Jacobsen í kjalarvørrinum av vitjanini hjá suðurafrikansku Lorraine Britten**

HJÁLP
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Eftir at hava vitjað í eina lítla viku er suðurafrikanska kvinnan Lorraine Britten farin heimaftur til "land vónarinnar", sum Suðurafrika mangan verður rópt. Í áratíggjur hevði óndskapurin, myrkrið og yvirgangurin fastatøkur á landinum, men fyrst í nítiárunum lýsnaði, og hol varð sett á eitt nýtt tíðarskeið við støði í fyrigeving millum eitt tvíbýtt fólk, sum skúgvaði egnan hevndarhug til síðis og valdi at hyggja frameftir.

Lorraine Britten var í fjølmiðlunum fyrr í vikuni í sambandi við, at hon fekk hollan stuðul og hjálp frá Amnesty í Føroyum, tá maður hennara sat sum fangi á Robben Island í sjeytiárunum sum offur fyri apartheid-stjórnini.

Tað var fyrrverandi forkvinnan í Amnesty, Anette Wang sáli, sum hevði áhaldandi brævasamskifti við Lorraine Britten í torføru tíðini undir apartheid, og tí var Lorraine í Føroyum í vikuni.

## Lívsjáttandi

Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum og virkin limur í Amnesty, stóð saman við Amnesty fyri ferðini hjá Lorraine Britten, og hann sigur, at ferðin var ein success fyri báðar partar, og hann hevur sjáldan hitt eina so karismatiska og inspirerandi kvinnu.

– Hon var lívsjáttandi og positiv, hóast hon hevur alla orsøk at vera beisk eftir ta órættvísi og tann óndskap, sum heimsøkti hana og familjuna. Hon lat ongantíð eitt ákærandi orð fella um teir, sum tóku mann hennara til fanga, og hon leit frameftir, sigur Óli Jacobsen. Hann heldur, at hetta eru eginleikar, føroyingar kundu lært nakað av.

Óli greiðir frá, at Lorraine í vikuni fekk høvið at vitja heimið hjá vinkonuni Anette Wang, og tað var kensluborið fyri Lorraine at síggja skrivimaskinuna og telefonina standa rúminum, har Anette hevur sitið ár út og ár inn fyri at ugga neyðstødd fólk úti í heimi.

– Hetta er eitt ítøkiligt dømi um eitt menniskja, sum velur at engagera seg í veruligar trupulleikar, og hvussu stóran týdning hetta hevur fyri neyðstødd menniskju, sigur Óli Jacobsen.

## Líkasæla

Fullur av íblástri eftir vitjanina úr Suðurafrika eftirlýsir stríðsmaðurin Óli Jacobsen størri eldhuga og stríðsanda millum føroyingar, og serliga liggur honum á hjarta at síggja ein virknari og visiónsríkari ungdóm.

Spurdur, um vitjanin hjá Lorraine Britten fer at fáa fleiri føroyingar at skriva brøv til avvarðandi hjá Amnesty samvitskufangum, og um vitjanin fær føroyingar at vakna úr dvala, er Óli ivasamur.

– Mínar royndir í Amnesty hava víst mær, at tað er sera torført at fáa føroyingar at engagera seg í veruligar trupulleikar og taka aktiv stig til at hjálpa neyðstøddum menniskjum. Miðskeiðis í okkara vælferðaryvirflóð og luksuslívsstíli er líkasælan eitt høvuðseyðkenni fyri okkum føroyingar, sigur Óli Jacobsen. Hann undirstrikar, at hann skal sjálvur vera tann fyrsti at taka í egnan barm.

Óli Jacobsen hevur eygleitt hetta lyndi føroyinga, og harmast hann serliga um ta líkasælu og tann passivitet, sum eyðkennir unga ættarliðið.

– Idealisman hjá ungdóminum er farin, og tað vísir seg at vera ógvuliga torført at fáa tey úr stólinum. Tað einasta, sum fær ungar føroyingar út á gøturnar, er stríðið fyri fleiri veitslum og betri møguleikum fyri alkoholnýtslu, og tað ger lítlan mun, vísir Óli Jacobsen á. Hann heldur, at tað mangan tykist platt, tá studentar og ungdómar fara út á gøturnar at mótmæla ymiskt, sum í veruleikanum ikki hevur nakran týdning samanborið við t.d. teir trupulleikar, føroyingar júst hava verið vitni til á vitjanini hjá Lorraine.

## Luksus

Óli Jacobsen heldur, at føroyingar mangan hava lyndi til at blása upp mál, sum í veruleikanum als ongan týdning hava, og tekur hann dømi frá forsíðu í Sosialinum í seinastu viku.

– Tað, at nakrar stakkals Restorff´s øl ikki verða seldar í Føroyahúsinum, eru reinar bagatellir samanborið við ta neyð og tann óndskap, sum valdar í heiminum, og sum m.a. Lorraine Britten hevur merkt á egnum kroppi. Vit føroyingar skuldu heldur kasta ljós á og engagera okkum í slíkt, slær Óli fast.

Spurdur, hvør orsøkin eftir hansara tykki er til passiva og initiativleysa ungdómin, peikar Óli á materiella støðið í Føroyum.

– Mín niðurstøða er, at bæði okkara ættarlið og tey ungu hava tað ov gott. Tað tykist eins og luksus og líkasæla fylgjast hond í hond, og hetta er syrgiligt, sigur Óli Jacobsen at enda, sum eftirlýsir ein virknari ungdóm og eitt virknari



# Rýma úr Runavík



*Fyrireikararnir av fiskivinnustevnuni, Fish Fair, staddir uttanfyri høllina hjá Poul Mohr á Sandvíkarhjalla. Komandi ár húsar føroya størsta høll fiskivinnuráðstevnuni, Fish Fair*

*Mynd: Jonhard Hammer*

**Fiskivinnustevnan, Fish Fair, verður komandi ár hildin í Havn. – Eg ivist ikki í, at dygdin á stevnuni fer at økjast munandi, nú vit kunnu savna hana undir einum taki. Ein trupulleiki í Runavík var, at vit máttu ansa eftir veðrinum, tí stórur partur av stevnuni var hildin í teltum, men hesum sleppa vit undan at hugsa um nú, sigur Dánjal Petur Hansen, fyrireikari av Fish Fair**

ÚR RUNAVÍK
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Fiskivinnustevnan, North Atlantic Fish Fair, skiftir ham. Fyrireikararnir av stevnuni hava gjørt av at flyta stevnuna úr Runavík til Havnar. Seinastu árini hevur fiskivinnustevnan verið hildin í Runavík, men í 2005 verður stevnan fyri fyrstu ferð hildin í Havn.

– Orsøkin til, at vit hava valt at flyta stevnuna eru fleiri. Tað gjørdist avgerandi, at Norrøna brádliga ikki varð tøk, tí hon hevur havt stóran týdning fyri stevnuna. Tað er heldur einki dulsmál, at vit eru ómetaliga fegnir um at hava fingið møguleikan at nýta stóru høllina á Sandvíkarhjalla til stevnuna, og hesin møguleiki spældi sjálvsagt eisini inn, sigur Dánjal Petur Hansen, ein av fyriskiparunum av fiskivinnustevnuni, Fish Fair.

## Størsta høllin

– Skalt tú skipa fyri eini stórari stevnu í Havn, slepst valla uttan Mohrarnar, og tað sluppu vit heldur ikki hesaferð, sigur Dánjal Petur skemtandi.

Fish Fair verður komandi ár hildin í stásiligu høllini hjá Poul Mohr á Sandvíkarhjalla. Høllin á Sandvíkarhjalla er størsta høllin í Føroyum, og hon fevnir um 5000 $m^2$. Fyrireikararnir vænta, at høllin kann húsa meginpartin av tiltøkunum í samband við stevnuna.

– Fyrimunirnir við at hava stevnuna á Sandvíkarhjalla er, at staðið er eitt sonevnt knútapunkt. Fólk, sum koma av flogvøllinum og úr Eysturoynni hava stuttan veg, eins og fólk úr Havnini hava tað. Parkeringsviðurskiftini eru eisini framúr á Sandvíkarhjalla, greiðir Dánjal Petur frá.

## Gott samstarv

Spurdur, um Rúnavíkar kommuna hevur givið ilt av sær, eftir at tað er komið undan kavi, at Fish Fair flytir til Havnar, svarar Dánjal Petur, at teir hava ikki fingið nakað ilt orð við á leiðini.

– Vit hava havt eitt fyrimyndarligt samstarv við Runavíkar kommunu, og kommunan hevur gjørt alt fyri at fáa stevnuna so væleydnaða sum gjørligt, sigur Dánjal Petur Hansen

## Stórur áhugi

2001 var fyrsta árið at skipað varð fyri Fish Fair í Føroyum. Fiskivinnustevnan er á øðrum hvørjum ári, og komandi ár verður stevnan hildin í døgunum 3-5 mai. Áhugin fyri stevnuni økist alsamt, og hagtøl boða frá, at bæði tali av luttakarum og básum er økt munandi frá stevnuni í 2001 til 2003.

Dánjal Petur Hansen sigur, at útlendski áhugin er nógv øktur, og fleiri útlendingar hava longu víst áhuga fyri stevnuni komandi ár. Hann leggur afturat, at fyrireikararnir til stevnuna í 2005 fara fyrst og fremst at leggja seg eftir dygdini á stevnuna heldur enn víddini.

– Við at hava allar neyðugu karmarnar í lagi, fáa vit økt um dygdina. Eg ivist ikki í, at dygdin á stevnuni fer at økjast munandi, nú vit kunnu savnað hana undir einum taki. Ein trupulleiki í Runavík var, at vit máttu ansa eftir veðrinum, tí stórur partur av stevnuni var hildin í teltum, men hesum sleppa vit undan at hugsa um nú, sigur Dánjal Petur Hansen at enda.




*-Fyrimunirnir við at hava stevnuna á Sandvíkarhjalla er, at staðið er eitt sonevnt knútapunkt. Fólk, sum koma av flogvøllinum og úr Eysturoynni hava stuttan veg, eins og fólk úr Havnini hava tað. Parkeringsviðurskiftini eru eisini framúr á Sandvíkarhjalla, greiðir Dánjal Petur Hansen, fyriskipari av Fish Fair, frá*

## Stór kapitalurin í Havn eigur munin

**Borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, er ómetaliga harmur um, at Fish Fair flytur til Havnar. – Spyrt tú meg, eg eri eg ikki í iva um, hvat er farið fram. Kommunan og stórkapitalurin í Havn hava snøgt sagt yvirbjóðað okkum, og longri er søgan ikki, sigur hann**

RÝMA ÚR RUNAVÍK
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Runavíkar Kommunu, Rodmundur Nielsen, sigur seg vera ómetaliga vónsviknan av framferðarháttinum hjá fyrireikarunum av Fish Fair.

– Spyrt tú meg, eg eri eg ikki í iva um, hvat er farið fram. Kommunan og stórkapitalurin í Havn hava snøgt sagt yvirbjóðað okkum, og longri er søgan ikki. Tað er eingin loyna, at vit hava lagt ómetaliga nógv í stevnuna, og tí kennist tað sárt, at vit nú brádliga missa stevnuna, sigur ein harmur Rodmundur Nielsen.

### Stutt skotbrá

Rúnarvíkar kommuna fekk boðini frá fyrireikarunum av Fish Fair í farnu viku um, at teir høvdu valt at stinga í sekkin og flyta stevnuna til Havnar. Rodmundur Nielsen heldur, at alt ov lang tíð er fráliðin, áðrenn teir fingu boðini.

– Vit hava verið á fleiri stevnum uttanlands, har vit hava greitt útlendingunum frá, at vit aftur í 2005 skipa fyri eini fiskivinnustevnu. Vit hava havt faldarar úti um stevnuna, og tí kennist ómetaliga sárt at fáa at vita, at eingin stevna verður í Runavík kortini, sigur borgarstjórin í Runavík.

Spurdur, um hann ikki skilir grundgevingarnar hjá fyrireikarunum um at flyta stevnuna, tá tað hevur eydnast teimum at fáa hendur á størstu høllini í Føroyum, svarar Rodmund, at tað skilir hann væl, men tað kennist kortini ómetaliga sárt.

### Stóran týdning

Spurdur, hvønn týdning stevnan hevur havt fyri Runavíkar kommuna, svarar Rodmund, at hon hevur havt ómetaligan stóran týdning.

– Í fjør vóru 11.000 vitjandi. Stevnan hevur havt stóra atdráttarmegi, og nú verður hesin møguleiki brádliga tikin frá okkum, og tað er við ringum tannabiti at vit mugu veittra stevnuni farvæl, sigur Rodmundur Nielsen at enda.